## VALGREINAR

# Viðmerking til valevni hjá Fólkaflokkinum í Suðuroy

**Finnleif Guttesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Eg vóni veruliga ikki, at øll valevni hjá Fólkaflokkinum siga ósatt, tí tað hevði verði stórt spell fyri allar Føroyar.

Eitt valevni hjá Fólkaflokkinum hevur eitt aftursvar til valevni hjá Sambandsflokkinum, sum vit yvirhøvur ikki hava biði um, men tað kann vera, at valevni svarar sum landsstýrismaður, tí har hevur tað mangla nakað í.

Annars er tað heilt ótrúliga skuffandi at síggja, at eitt valevni sum av útbúgving og sum landsstýrismaður skal skriva so nógv ósatt, sum hann ger.

Betri er bøtandi hond enn spillandi tunga.- lat okkum tí heldur arbeiða fyri einari menning av Suðuroy saman.

Vel tí Sambandsflokkin.

# Gullegg Sambandsfloksins: Skattalækking

**Marjus Dam**
*valevni Sambandsfloksins í Vágum*



Vit vilja og tora at lækka skattin. Vit vísa leið.

Sambandsflokkurin vil hava hægsta skatt frá 60% niður á 40% av síðst vunnu krónu. Tað skal loysa seg at arbeiða fyri tann, ið arbeiðir - og ikki bert loysa seg fyri landskassan at fólk arbeiða. Hvørki føroyingar ella vinna orka meira lemjandi og køvandi skattin. Tí fara 60 - 70 % av okkara tilfeingi óviðgjørt av landinum. Á vestfallið við bæði loysing og fullveldi, tí tað merkir eina skattaøking í meðal uppá 54000 krónur ella knappar 4500 kr afturat um mánaðin, umframt mist rættindir.

- Hinir vilja nýta pening til loysing - og hava økt skattatrekki og minka reallønina..
- Okkara gullegg økir reallønina og vælferð hjá øllum bólkum, ið arbeiða her á landi.
- Okkara uppskot økir arbeiðsgleðina
- Stimbrar vinnuna
- Skapar fleiri arbeiðspláss og møguleikar
- Lívgar arbeiðandi fólki, familjuna og børnini
- Okkara uppskot er eitt ítøkiligt gullegg bæði fyri vinnu og allar føroyingar.
- Vit vilja nýta pening til at bøta um vælferð føroyinga
- Men vit hava ikki ráð at loysa - m.a tí vælferðin skal økjast í verki.
- Koma vit í samgongu - so verður gulleggið lagt - tí vit tora og hava loysnirnar.
- X -lista B - vælferð, framburð og ... gullegg

# Aftursvar til Jacob Vestergaard, landsstýrismann Fólkfloksins

**Svenning Borg**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



At jólaheilsan mín til allar suðringar skuldi vekja Jacob Vastergaard ur svøvni í fiskimálaráðnum, eri eg bert glaður fyri, men meira glaður eri eg fyri, at eg ikki vakti hann fyrr, hugsandi um, hvat óbótaligan skaða, maðurin kundi gjørt.

At nýggjur Smyril verður bygdur nú, kom bert av tí,at hesin gamli Smyril hevur siglingarloyvi til 2005, eitt samt løgting tók undir við at byggja tann nýggja smyril, men serliga glaður eri eg fyri, at uppskotið hjá vinnumálaráðharranum hjá fólkaflokkinum um, at gamla Nørruna skuldi røkja suðuroyarsiglingina, bleiv til onkisgjørt.

At ferðaseðlaprísurin á smyrli er farin upp, er eisini fráfarandi samgongu fyri at takka,Sambandsflokkurin heví uppskot á tingi um sama ferðaseðlaprís á øllum rutum hjá strandferðsluni, men bleiv tað felt. Ein smeitur fyri vinnuna í Suðuroynni

At djúphavnin í Vági verður bygd, er mest virkisfúsnum sambandsmonnum fyri at takka, sjálvur havi eg roynt eftir førimuni at vera við og stuðla vinnuni í Suðuroynni, nú Harra Vestergaard so forhánilsliga nevnir virkisfýsnar sambandsmenn, kundi verði áhugavert at frætt um hansara virkisfýsni, hvar tað er.

Støðan á havnalagnum í Vági er sera ring,mest sum onki arbeiði er har, hetta sær sambandsflokkurin og hevur sínar ætlarnir á hesum øki, hevur Jacob ikki sæð hettar, ella ger hann sum Nelson,setur kikaran fyri blinda eyga.

Miðnamsskúla hava okur havt í Suðuroynni nú í nógv ár,at okur fáa nýggjan bygning at hava skúlan í ,er bert gleðiligt,men syrgiligt er tað,at tey sum koma út av hesum skúla,ikki kunnu fáa arbeiði í oynni,sitandi samgonga hevur sett yvir hundrað almenn størv um árið í miðstaðarøkinum, ikki eitt starv til okur Suðringar,hettar er økismenning við lít, bert spell at Suðuroyggin ikki kundi fáa part av hesi økismenning.

Kanska veksa trøini hjá Vestergaard inn í himmalin, tað gera míni so ikki, vinnupolitikkurin hjá fólkaflokkinum er við at avtofta oynna. Tað er hin nakni veruleikin.

At undirrittaði býr í Vági er hann bert stoltur av, vónandi kann eg halda áfram at búgva her til síðsta andadrátt,í vónini um, at yngra ættarligi tekur við, har í ein sjálvur slepti.

# Skal rækjuvinnan stuðlast??

**Ragnar S. Olsen**
*valevni Fólkafloksins í Eysturoy*



Einaferð var tað ein maður.

Hann hevði bæði konu og børn, og megnaði væl at syrgja fyri sær og sínum í allar mátar.

Ein dagin er hann só óheppin, at hann dettur og brýtur bæði beinini so illa, at leggirnir stinga út.

Hann liggur og rópar um hjálp.

**Dømi 1 (tey "heiløgu")**
Nei, hann má klára seg sjálvur. Vit mugu í øllum førum fyrst síggja tíðina an, hvussu hetta fer at taka seg upp.

Stakkalin liggur og fær einki gjørt, bruni kemur í sárini, og endin er at eisini rot kemur í.

Jú, nú doyr hann um vit ikki taka okkum av honum, men nú er ov seint, beinini mugu takast, og persónurin kemur ongantíð aftur at ganga. Hann má fáa avlamishjálp restina av lívinum.

**Dømi 2 (tey konstruktivu)**
Jú, lat okkum fáa hann á sjúkrahúsið, fyri at leggja beinini undir skurð og seta tey saman aftur.

Hann kemur ikki at ganga sjálvur fyrstu tíðina, men geva vit honum røttu viðgerðina og røttu hjálpiamboðini, verður hann fullførur aftur um ikki so langa tíð.

Tá kann hann halda áfram við sínum dagliga lívi, og familjan fær sín forsyrgjara aftur.

Nú siga vit at maðurin í søguni omanfyri er rækjuvinnan.

**Dømi 1: (tey "heiløgu")**
Tað ljóðar frá flestu flokkum og búskaparfrøðingum, at tað ongantíð skal koma upp á tal at stuðula vinnulívinum. Heldur ikki um vinnan er í svárari kreppu.

Sagt verður beinleiðis, at um rækjuvinnan ikki klárar seg, ja, so má hon heldur bara fara fyri bakka. Okkurt skip verður kanska eftir til at fiska kvotuna í Eysturgrønlandi.

Tað eru kanska 300 ársverk í rækjuvinnuni, men tey finna helst okkurt annað at gera, í hvussu so er yvirmennirnir, verður sagt. Restin fáa kanska okkurt frá ALS sum fráliður.

Føroyska samfelagið hevur ikki tørv á tí, sum rækjuvinnan gevur til samfelagið, siga tey.

**Dømi 2: (tey konstruktivu)**
Her er talan um at veita hjálp, skjóta hjálp. Men umráðandi er, at tað er tann rætta hjálpin, ið verður veitt.

Tað skal takast hond um har tað er neyðugt, og bert so leingi tað er neyðugt.

Vit vita at rækjuvinnan hevur klárað seg og síni fyrr, og verður tað helst aftur. Og tað er júst tað, ið vit skulu finna útav.

Vísir tað seg at eingin glotti er at hóma, heldur ikki um nøkur fá ár, er støðan ein heilt onnur, men tað er einki sum týðir uppá, at man er komin niður á eitt støði, ið man ikki kemur uppúr aftur.

Vit ynskja ikki at rækjuvinnan skal fáa hjálpast restina av ævini, men at hon fær hjálp til sjálvhjálp, fyri at hon aftur kann gerast eitt av beinunum, sum hetta samfelagið hevur at standa á.

ES. Tann ið einki ger, ger einki skeivt, verður sagt. Stundum er tað skeivt einki at gera.

# Eldraøkið

**Edva Jacobsen**
*vælevni sambandsfloksins í Eysturoy*



Eitt av hjartamálinum hjá sambandsflokkinum er at raðfesta eldraøki í fremstu røð. Vit vilja virka fyri framhaldandi menning og útbygging av heimarøktini, so tit eldru kunnu vera longst møguligt heima hjá tykkum sjálvum. Tað vera tó altíð nógv sum als ikki kunnu vera heima, og tí má skipast soleiðis fyri at hildi verður fram við útbyggingum á eldraøkinum, tað veri seg at byggja ellis- og røktarheim, sambýli og íbúðir hóskandi serliga til eldri fólk.

Framrokningar vísa at talið av pensionistum fer at økjast tey komandi árini og tí er tað sera týdningarmikið at eldraøki verður raðfest høgt soleiðis at tit eldru ikki skulu føla tykkum sum eina byrðu fyri samfelagið, men sum ein samfelagsbólk ið far nøkur natúrlig givin rættindi, tað eru jú tit sum hava syrgt fyri at samfelagshjólini hava mali, soleiðis at Føroyar í dag eru at rokna sum eitt valferðarsamfelag, sum vit mugu gera alt fyri at varðveita.

Vælferðin verður best varveitt við at velja ein sterkan sambandsflokk inn á ting.

Vel tryggleika - vel samband


# FRÁ KLIVANUM



Søkt verður eftir fyrikomandi fólki við starvsroyndum til handilin

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Klivin**
Postboks 1232
110 Tórshavn
tel 318110

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Vøggustovan og barnagarðurin við Velbastaðvegin**

Á stovninum ganga 101 børn.

Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 10 børnum í hvørjari.

1. januar í ár varð stovnurin kommunalur og lagdur undir ein leiðara. Fyri framman liggja útbýggingar og nýtímansgerð av stovninum. Tann, ið settur verður, kemur at hava sítt dagliga yrki á vøggustovuni.

Stovnurin er 30 ár og liggur sera væl fyri við stórum og fjøltáttaðum spæliplássi og stutt er burtur í haga, oman í Sandá og fjøru.

www.torshavn.fo

## Varaleiðari til vøggustovuna og barnagarðin við Velbastaðvegin

Tórshavnar kommuna søkir eftir varaleiðara 40 tímar um vikuna til barnagarðin og vøggustovuna við Velbastaðvegin at byrja 1. mars 2004.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika til at seta tín dám á stovnin
- ávirkan á leiðslubygnaðin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit ynskja at tú**
- ert útbúgvin pedagogur
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- tekur tær av tí dagliga umsitingarliga arbeiðinum í samstarvi við leiðaran, samstundis skalt tú vera eldhugað/ur fyri tí pedagogiska arbeiðinum við børnunum
- hevur holla ástøðiliga vitan
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag merktan av virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- sært møguleikar framum forðingar
- hevur kunnleika til KT-tøkni

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Monu R. Mohr, leiðara, og Ingilín Berg, varaleiðara, tlf. 31 43 73.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera vøggustovuni- og barnagarðinum við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. januar 2004.

## Goymsluhøll til sølu

Goymsluhøll, partvíst við tveimum dekkum, uml. 630 m², kann møguliga ognast við sjálvi at taka høllina niður. Høllin stendur á økinum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Vegna byggivirksemi á økinum er tað av stórum týdningi at høllin verður tikin niður sum skjótast. Meira fæst at vita við at venda sær til Kára Dal-Christiansen á tlf. 243341

**Føroya Tele**
Boks 27
110 Tórshavn

www.sosialurin.fo

## Frá Havnar Bóltfelag

Ársaðalfundur felagsins verður mánadagin 26. januar 2004 kl. 19.00 í HB-húsinum.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Havnar Bóltfelag**

## Frá P/f Havnar Fótbóltur

Ársaðalfundur felagsins verður mánadagin 26. januar 2004 kl. 20.30 í HB-húsinum. Skrá sambært lógum felagsins.

**P/f Havnar Fótbóltur**

## Bilur til sølu



Peugeot 206 cc árgangur 2001, koyrt 25.000 km. Prísur 128.000 kr.

**Tlf. 372737**

## Bilur til sølu



Ford Escort 1.3 CL, árg. 95 í góðum standi til sølu fyri 45.000 kr. Bilur við virði á 10-15.000 kr. kann ganga inn í keypið.

**Tlf. 543066**

## GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

## Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

## Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045